# Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran …**



Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.

Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:..........................................................................................................
Bústaður:.....................................................................................................
Bygd/býur:.....................................................Tel:.................................
Evt. arbeiðspláss:.........................................................................................

Merkisdagurin er: ..........................................................................................

Innsendari: ...........................................................Tel:............................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 311820/216135, fax 314720, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 458686, fax 458687, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 447820, fax 449520, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 375364, fax 375464, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 333820, fax 333720, teldupost: edvard@sosialurin.fo








Lesið Sosialin


# Frá Runavíkar skúlastýri

Søkt verður eftir lærara til Runavíkar Kommunuskúla at byrja 1. mars 2003.

Starvið er fulla tíð, og í tímatalvuni eru m.a.:

- Rokning í 4. flokki
- Alisfrøði í 7. flokki
- Natúr og tøkni í 4. og 5. flokki
- Gentuítróttur í 8. flokki

Starvið, sum er tíðaravmarkað til skúlaárið 2002/2003, verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja á tlf. 447331.

Umsóknirnar skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 21. februar 2003.

**Skúlastýrið í Runavíkar Kommunu**
v/ Malan Rasmussen, tlf. 441842
FO 660 Søldarfjørður

**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag**

# Aðalfundur

**Aðalfundur felagsins verður**
**12. februar 2003 kl. 19.30**

Fundurin verður í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J.H.Schrøtersgøta 9.

Dagsskrá:

1. Val av fundarstjóra
2. Frágreiðing frá stjórnini frá farna árið
3. Framløga av grannskoðaðum roknskapi
4. Val av formanni
5. Val av tveimum stjórnarlimum
6. Val av tveimum tiltakslimum
7. Val av tveimum grannskoðarum
8. Áseting av limagjaldi
9. Uppskot frá nevndinium lógarbroyting
10. Ymiskt

**Nevndin**

FØROYA PEDAGOG FELAG

# Limafundur fyri leiðarar

Mogens Seider, næstform. og Vagn Michelsen frá SL skipað fyri fundi fyri allar leiðarar við evninum: **Lederne og fagforening**

**á Hotel Hafnia 21. febr. 03 kl. 9.30-11.30.**

**Føroya Pedagogfelag**

# Jørð á Selatrað til sølu

Við hesum verða 12 gyllin og 3 skinn í »Garðshaga Uttari«lýst til sølu.

Eisini verða tilsamans 5.678 m² av innangarðsjørð á Selatrað lýst til sølu.

Innangarðsjørðin umfatar matr. 10, Selatrað, sum er »Ytra Fornamørk« sum er 5.281 m ² til víddar og partar av matr. nr. 107, Selatrað, »Úti á Oyri« sum er 392 m² til víddar.

Jørðin verður seld um hóskandi boð fæst.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Christian Andreasen, adv.

**Advokatskrivstovan**
Fr. Petersensgøta 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145

# Lærari

Fyri lærara í barnsburðarfarloyvi søkja vit eftir lærara til Sands skúla 19 tímar um vikuna frá 12. mars 2003 til 1. januar 2004.

Nærri upplýsingar um starvið fáast frá fyrstalæraranum á tlf. 361647 ella 161127.

Umsóknir við próguvm og møguligum viðmælum skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 23.2.2003.

**Skúlastýrið fyri Sands skúla**
att.: Anna Horn
210 Sandur

# Føroya Ríðingarfelag

Ársaðalfundur verður 25. febr. 2003 í felagshúsinum í Havnardali kl. 19.30.

Seinasti dagur at keypa atgongumerki til 60 ára veitsluna er 25. febr. Veitsla verður í Argja Róðrafelag 8. mars.

**Nevndin**

Sosialurin



# Marknaðarfólk

STARV sosialurin

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álítandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann persónurin, sum vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera viðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara, og sum í ávísan mun eisini kann átaka sær leiðsluuppgávur.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum. Kundarøkt, account-management og telemarketing eru eisini arbeiðsuppgávur, sum vit framyvir koma at leggja enn størri dent á, og kemur starvið eisini partvíst at fevna um hesi øki.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú eisini við í dagligu framleiðsluni av blaðnum. Herundir planlegging av lýsingarátøkum, temabløðum og lýsingartilboðum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú sjálvandi eisini vælkomin at seta teg í samband við Jákup Mørk, fíggjarleiðara, á tlf. 311820. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á jakup@sosialurin.fo

Umsóknarfreistin er 25. februar, og skal umstóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

**Sosialurin**
**Jan Müller**
**Postsmoga 76**
**110 Tórshavn**

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.


BILSKROKK



**Lakering & Plátuverkstaður**
**v/Brynleif Askildsen**

Vit hjálpa fólki við bilskaðum, ið umfata millum annað, lakering, tryggingarskaðar, buglur, rust og mangt annað.

Ring til okkara og fá eitt gott tilboð.

Tlf. 32 24 71 • 21 24 71
Slættanesgøta 9 • boks 2227 • FO-110 Tórshavn


# Skeið á Húsarhaldsskúla Føroya 2003

## Lær at seyma vest til tann føroyska búnan: (Vikuskiftisskeið)

Vikuskiftisskeið 28 - 29 mars og 4 - 5 apríl
Skeiðið byrjar fríggjakvøld kl. 19:00 - 22:00 og leygardag frá kl. 9:00 - 16:00
Undirvísari : Malena Andreasen
Kostnaður fyri skeiðið er kr. 700,- íroknað mat, ikki tilfar.

## Lær at seyma buksur til tann føroyska búnan: (Vikuskiftisskeið)

Vikuskiftisskeið 25 - 26 apríl og 2 - 3 mai.
Skeiðið byrjar fríggjakvøld kl. 19:00 - 22:00 og leygardag frá kl. 9:00 - 16:00
Undirvísari: Malena Andreasen
Kostnaður fyri skeiðið er kr. 700,- íroknað mat, ikki tilfar.

## Skeið í maskinbinding:.

Frálæra verður givin í maskinbinding, serligur dentur verður lagdur á at binda við Silver Reed maskinunum.
Skeiðið er frá 27 - 29 mars og frá 3-5 apríl.
Byrjað verður hóskvøld frá kl. 19:00 - 22:00
Fríggja- og leygardag frá kl. 9:30 - 16:00
Undirvísari: Elspa Sumberg
Kostnaður fyri skeiði er kr. 1200,- íroknað mat, ikki tilfar.

## Tilgerð av knappatroyggju til mannfólkabúnan (vikuskiftisskeið)

Frálæra verður givin í tilgerð av knappatroyggju til mannfólkabúnan.
Vikuskiftisskeið 25 - 26 apríl og 2 - 3 mai
Skeiðið byrjar fríggjakvøld kl. 19:00 - 22:00 og leygardag frá kl. 9:00 - 16:00
Undirvísari: Elspa Sumberg
Kostnaður fyri skeiði er kr. 700,- íroknað mat, ikki tilfar.

## Brodering til føroysk klæðir / pergamano: (vikuskeið)

Frálæra verður givin í at tekna mynstur til fyriklæð og turriklæð til føroysk klæðir úr føroysku floraðini, og í brodering og montering. Møguleiki er eisini at brodera og at tekna mynstur til ymiskt annað so sum gardinur og dúkar.
Eisini verður frálæra givin í pergamano gera ymisk kort og annað.
Skeiðið er frá 29. apríl til 3. mai. Undirvíst verður frá kl. 9:00 - 16:00
Skeiðið endar fríggjadagin kl. 15:00
Undirvísari : Jutta Hansen
Kostnaður fyri skeiði er kr. 1200,- íroknað mat, ikki tilfar.

## Domino binding (patchworkbinding) : vikuskeið

Ein annaðleiðis og spennandi bindiháttur. Frálæra verður givin í grundteknikki í patchworkbinding, at hefta endar saman meðan bundi verður, gera ætlan um lutir og pløgg, at gera kantbinding og útrokningar.
Skeiðið er frá 29 apríl til 3 mai. Undirvíst verður frá kl. 9:00 - 16:00
Skeiðið endar fríggjadagin kl. 15:00
Undirvísari: Paulina Eliasen.
Kostnaður fyri skeiðið er kr. 1200,- íroknað mat, ikki tilfar

## Heilsugóður matur / ymiskt handarbeið: (vikuskeið)

Frálæra verður givin í heilsugóðum mati, ymiskum handarbeið, so sum silkimáling, brodering, føroysk bond, tøving o.a útferð.
Undirvísarar: Jutta Hansen, Paulina Eliasen, Anna Evensa Abrahamsen, Elisabeth Akursmørk og Jóhanna á Tjaldrafløtti,
Skeið er frá 2 - 6 juni. Skeiðið er eitt vistarskeið
Kostnaður fyri skeiði er kr. 1500,- íroknað mat og gisting.

**Tilmeldað skal verða í seinasta lagi 1 viku áðrenn skeiðið byrjar.**
**Møguleiki er fyri at gista á skúlanum, til øll skeiðini.**
**Til handarbeiðskeiðini er ikki neyðugt at hava seymimaskinu við.**
**Skúlin hevur øll seymiamboð.**

**Fleiri upplýsingar um skeiðini fáast við at venda sær til skúlan.**
**Viðmerkjast skal at tað er avmarkað luttøka til øll skeiðini.**

**Húsarhaldsskúli Føroya**
**Stoksoyrarvegur 29, 700 Klaksvík**
**Tlf. 456974 e-mail hsf@post.olivant.fo**
**www.husarhaldsskulin.fo**

HSF